# Hópkoppsetingin er uppskriftin til eina katastrofu

**Koppsetningin móti svínakrími vandameiri enn sjúkan, siga tveir granskarar frá ISIS**

SVÍNAKRÍM

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Vaksinan ímóti svínakríminum er meiri deyðilig enn svínainfluensan sjálv, og hópvaksinatión er uppskriftin til eina katastrofu, siga doktor Mae-Wan Ho og Joe Cummins professor í nýggjari, drúgvari rapport. Tey starvast á kenda stovninum ISIS, og gransking teirra kritiserar koppsetingar-hysteríið, sum í hesum døgum herjar kring heimin.

Norska heimasíðan www.fritthelsevalg.org hevur lagt fleiri partar av rapportini hjá Mae-Wan Ho og Joe Cummins út til almenningin at lesa.Tey finnast at, at fleiri lond ætla at vaccinera alt fólkið, tí koppingarevnið fer bert at verða royndt í fáar vikur áðrenn tað verður latið út til almenningin. Harvið veit man altso einki um langtíðarárin av koppingarevninum.

Hartil er influensan so mikið mild, at tað er hol í høvdið at koppseta øll. Í Onglandi, sum er harðast rakt av sívakrími, er deyðstalið av H1N1 bara 0,03%. Helst er talið enn minni, tí ikki allir sjúkutilburðir eru blvinir skrásettir, tá farið varð upp á sætta tilbúgvingarstig.

Kritikarar siga eisini, at koppsetingar-serfrøðingarnir, sum hava mælt til, at øll skulu koppsetast, eru í lummanum hjá koppsetingarframleiðarunum, sum fara at forvinna ovurstórar upphæddir, um landsstýrini í ymsu londunum gera av, at øll skulu koppsetast.

Sterkasta argumentið ímóti, at vaccinan ikki skal nýtast er, at tað ikki riggar at koppseta ímóti influensu, og at koppingarevnið beinleiðis kann vera vandamikið.

Seinastu ferð USA hópkoppsetti var í 1976. Tá endaði tað við eini vanlukku. 40 milliónir vóru koppsett móti eini sjúku, sum als ikki var vandamikil. Minst 25 doyðu av vaccinuni, og túsundtals fólk søktu um endurgjald fyri varandi mein, tey fingu av koppsetingini.

Koppingarevnið, sum bretska felagið Glaxo Smith Kline framleiðir, fer bert at verða roynt til nøkur heilt fá fólk, áðrenn tað verður latið almenninginum, tí framleiðarin hevur sagt, at tey mugu "uppvigað vandan fyri pandemi ímóti vandanum viðeini ótryggum koppingarevni". Og sambært teimum er tað er týdningarmeiri, at týna pandemiina.

Professor Hugh Pennington, mikrobiolog, heldur hetta vera eina óhepna og vandamikla gongd. "Við at skerja talið av kliniskum testum, økir Glaxo Smith Kline um vandan fyri einum koppingarevni, sum ikki er rætt doserað, og tað kann føra til eitt koppingarevni, sum ikki verjir móti sjúkuni ella er ótrygg á annan hátt, sigur hann.


TAKS

## Vit sóknast eftir fleiri kundarøktarum

**Hevur tú tænastulyndi** og er hugað/ur at møta viðskiftafólkinum, har tey eru stødd, so ert tú kanska næsti kundarøktarin hjá TAKS.

**Sum kundarøktari** gerst tú partur av einum livandi, fjølbroyttum og sjálvstøðugum arbeiðsplássi. Á stovninum er eingin dagur eins, og tí kann tín smidligleiki viðvirka til at gera allan munin.

**Høvuðsuppgávurnar** hjá kundarøktarunum eru at røkja kundatænastuna og at seta í journal.

**Vit ímynda okkum**, at tú hevur HH ella aðra miðnámsútbúgving, skrivstovuútbúgving og/ella aðra líknandi útbúgving.

**Vit vanta**, at tú er til reiðar at menna teg saman við stovninum og er sinnað/ur at ogna tær nýgga vitan. At tú tekur við ábyrgd á tínum arbeiðsøki, hevur góð samstarvsevnir, skapar úrslit og ger títt til at skapa arbeiðsgleði, tað taka vit sum ein sjálvsagdan lut.

**Setanarøkið** fevnir um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Kundatænastan húsast á Argjum.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Ásu Olsen, leiðara á kundatænastuni á telefon 352600.

**Umsókn**, CV og avrit av prógvum, og viðmælum skal sendast til taks@taks.fo ella **TAKS, Postsmoga 2151, FO-165 Argir.**

Umsóknin skal stílast til Ásu Olsen, leiðara í kundatænastuni og viðmerkjast: Umsókn, kundarøktari. Freistin at søkja starvið er 20. august kl. 15.00

*Vit trygga landskassanum skatta- og avgjaldsinntøkur. Eyðkenni okkara skal vera góð tænasta.*
*Misjónin hjá TAKS*

TAKS er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjalsskattalógina og innheintingar innan málsøkini hjá stovninum. TAKS hevur 135 starvsfólk og er skipað við einari høvuðseind á Argjum og trimum skrivstovueindum runt landið.

AEL Presenterar Nashville.fo

# MEIRA ENN BARA EIN KONSERT

**Keyp atgongumerki á Kr. 395 á nashville.fo, Statoil-støðum kring landið, Expert í SMS ella við at smsa „NV" til 1906. Sms-boðið kostar kr. 395 pluss vanligt sms-gjald.**

**Loyniorðið í kvittanarboðunum er atgongumerkið til konsertina. Allir kundar hjá Føroya Tele kunnu nýta tænastuna.**

**Gev gætur, at endurgjald verður ikki latið fyri burturblivin sms-atgongumerki.**

ALEX BÆRENTSEN
ÓLAVUR HØJGAARD
LINDA ANDREWS
MAGNI CHRISTIANSEN
4
REGIN GUTTESEN
HALLUR JOENSEN
SVEIN ASKILDSEN
GUNNAR JUSTINUSSEN
LISA FREDERIKSBERG
SIGRID RASMUSEN
KIM HANSEN
TORKIL MØRKØRE
THEODOR PETERSEN
OG
DREAM TEAM ÚR NASHVILLE

29. AUGUST Í HØLLINI Á HÁLSI

SENDISTOVAN

FØROYATELE · Eik · Sosialurin · Føroya Bjór